


*- Eg vænti ikki, at eg nakrantíð komi at gera ein so skjótan og góðan túr aftur, sum vit gjørdu seinna vártúrin í fjør, sigur skiparin á Ennibergi, Sonny Johannesen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**... plátufrystararnir eru allir líka gamlir, og nú onkur pláta so smátt er byrjað at leka, verða allir skiftir...**

# Loysa tá skipið er klárt

**- Eg vænti, at vit loysa, tá skipið er klárt. Dugi onga meining at síggja í, at Enniberg sum hin einasti flakatrolarin skal liggja, tá vit annars eru klárir at loysa, sigur skiparin á Ennibergi, Sonny Johannesen**

Vilmund Jacobsen

Enniberg, sum er einasti flakatrolarin, ið ikki er til fiskiskap, er ikki klárur at loysa enn. Hinir bæði skipini, Gadus og Vesturvón, fiska í Gráu leiðini í Barentshavinum og hava havt góðan fiskiskap. Gadus fór avstað beint eftir jól, og Vesturvón fór avstað ein av fyrstu døgunum í hesum árinum.

Hesi bæði skipini eru tískil ikki rakt av verkbanninum, sum Føroya Reiðarafelag lýsti næst einasta mánadag.

Við flakatrolarum luttekur manningin longu í oljuútreiðslunum, tá skipini eru á flakaveiði, men ikki, tá tey royna eftir rundum heilum fiski, eitt nú í Irmingarhavinum.

## Fara at loysa

Sonny Johannesen, skipari á Ennibergi, ætlar sær at loysa skipið, tá alt er klárt, sum nú verður gjørt.

- Nú vita vit sjálvasagt ikki, hvat hendir millum partarnar í dag, nú semingsstovnurin er komin upp í aftur samráðingarnar, og ætlanin er at royna seming í dag.

Skiparin vísir á, at Enniberg, sum liggur við Vestaru Bryggju í Havn, ikki verður klárur at loysa fyrr enn um eina viku ella so.

- Eg dugi onga meining at síggja í, at Enniberg, sum hin einasti av flakatrolarunum, møguliga skal noyðast at liggja, meðan hini skipini sleppa at fiska. Eg væntí tí, at vit loysa, tá skipið er klárt, sigur hann.

Enniberg hevur skift ljósmotor, og nú verða eisini teir tríggir plátufrystararnir skiftir.

- Arbeiði at skifta ljósmotor er um at verða liðugt, og í komandi viku skal hann roynast.

Sonny sigur, at plátufrystararnir eru allir líka gamlir, og nú onkur pláta so smátt er byrjað at leka, verða teir allir skiftir undir einum.

- Tað er maskinfólkið hjá okkum, sum ger arbeiðið við plátufrystarunum, leggur hann aftrat.



*Flakatrolarin Enniberg hevur skift ljósmotor, og nú verða eisini teir tríggir plátufrystararnir skiftir*

## 38 mans við

Tá Enniberg fer at loysa, verða 38 mans við.

- Vit fara helst upp í Barentshavið at royna.

Skiparin vísir á, at teir gjørdu tveir rættiliga góðar túrar í byrjanini av 2010, og hin seinni av hesum man vera tann besti, sum skipið nakrantíð hevur gjørt.

- Tá fóru vit avstað millum jól og nýggjárs og vóru heim aftur 21. februar. Vit lógu fram til 12. mars, tá vit fóru avstað aftur og vóru heima í Føroyum aftur 26. apríl við umleið 900 tonsum í flaki.

Sonny Johannesen sigur, at teir hendan seinna vártúrin fiskaðu í ein mánaða, og hann sigur seg ikki vita um nakran so skjótan túr í Barentshavinum áður.

- Eg vænti ikki, at eg nakrantíð komi at uppliva at gera ein so skjótan og góðan túr aftur, sigur skiparin á Ennibergi.

Manningarparturin á hesum seinna túrinum í fjør vár lá um einar 280.000 krónur, sum má sigast at vera rættiliga gott eftir at hava verið úr Føroyum í tilsamans 46 dagar.

**... manningarparturin á seinna vártúrinum í fjør lá um einar 280.000 krónur...**